## FCK móti Monaco

**Ein svenskur og ein norskur miðvallari skulu hjála Toda og liðfeløgunum at sleppa upp í part í europeiska bólkaspælinum**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Skuldi tað vera ein svenskur miðvallarspælari, ella skuldi tað vera ein norskur miðvallarspælari. Hetta hevur verið spurningurin, sum danska pressan hevur viðgjørt síðstu vikuna.

Nú hevur leiðslan í FCK svarað. Teir hava keypt bæði norska Magne Hoseth, sum er fyrrverandi liðfelagi hjá Jákupi Mikkelsen í FCK, og svenska Thomas Linderoth, sum hevur spælt í Everton, har hann ikki hevur megnað at vunnið sær fast pláss á liðnum.

Felags fyri ter báðar er, at teir eru landsliðsspælarar.

Fyrrapartin í gjár varð greitt, at FCK í triðja og avgerandi umfarinum í Euruopa Cup skal spæla ímóti Monaco. FCK skal fyrst spæla á heimavølli.

Fyritreytin er sjálvandi, at FCK megnar at vinna samantalt ímóti slovenska meistaraliðnum. Tað sær gott út. FCK vann útidystin 2-1. Álvaro Santos og Peter Møller vóru í álopinum, og teir skoraðu eitt mál í part.

Monaco er vorðið sum biti. Í síðstu kapping rukku teir í finaluna, har teir noyddust at lúta fyri FC Porto,

Todi Jónsson kom á vøllin, tá ið tveir minuttir vóru eftir. Hetta var 200. ferðin, at hann var á FCK liðnum. Fyrsta ferðin var 27. juli í 1997, tá ið FCK á heimavølli vann 2-1 á Vejle.




# Eingin er sum Jarnbardur

**Mest sannførandi sigurin av øllum á Ólavsøku vunnu kvinnurnar úr Knørrafelagnum, sum harvið vórðu einasta manningin, ið megnaði at vinna allar róðrarnar í 2004**

6-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Tað hevur leingi verið greitt, og á Ólavsøku varð tað sligið rimmar fast. Kvinnurnar umborð á Jarnbardi hava verið besta kappróðrarmanningin í hesum róðrarárinum.

Um nakar hevði verið í iva, so mundi ivin rudduliga verða ruddaður á Havnarvág mikudagin. Jarnbardur hevði góðan start. Lómur av Argjum royndi eina løtu at hanga uppií, men hálvi skuturin gjørdist skjótt til heilan skut, og so var spurningurin bara, hvør fór at vinna næstfremsta plássið.

Jarnbardur fór spakuliga frá hinum bátunum. Framvið Molanum øktist munurin aftur til teir næstu til eina bátslongd, og Jarnbardur hevði verið gott og væl leysur av hinum, tá ið hann kom á mál. Tá var munurin ein bátslongd.

Páll Fangi hevur við undantaki av einari kapping átt næstfremsta plássið. Hesa ferð ætlaðu tær úr Klaksvík at fáa bilbukt við Jarnbardi. Men Páll Fangi fekk einki serligan start. Tær vóru á fjórða plássinum, aftanfyri Lóm og Sølmund. Hesin síðst nevndi misti luftina, tá ið hálvur teinurin var rógvin.

Á Molanum hevði Páll Fangi longu givið fyrstu ábendingarnar um, at tær ætlaðu sær meiri enn fjórða plássið. Í handavend tók Páll Fangi seg fram á næstfremsta plássið, og eina løtu tóktist tað sum um, at tað skuldi hepnast teimum at fara eftir Jarnbardi. Páll Fangi fekk um róðrið á Jarnbardi, men so settu tær umborð á Jarnbardi meiri á aftur, og harvið vístu tær Pálli Fanga durðafjórðingin.

Framvið Molanum var fjarstøðan frá Jarnbardi og til Páll Fanga umleið tann sama, sum hon var frá Páll Fanga og aftur til fleiri av hinum. Kappingin um bronsuplássið var rættuliga tøtt. Báðir bátarnir hjá Havnar Róðrarfelag - Gongurólvur og Víkingur - høvdu hug at bjóða av, men tá ið alt kom til alt, so komu bátarnir á málið í tí røðini, sum teir eisini endaðu FM kappingina upp við. Men munurin frá bronsuplássinum og aftur til fimta plássið var lítil og eingin.

Jarnbardur var sannførandi vinnari, og so er spurningurin, um tær fara at taka eitt tørn afturat. Eftir ólavsøkuróðurin eru tað ivaleyst fleiri umborð á Jarnbardi, sum tað eisini eru umborð á so nógvum øðrum bátum, ið hava besta hugin at gevast. Men tað er ikki altíð, at meiningin og ætlanirnar eru tær somu eftir ólavsøkuróðurin, sum tær eru, tá ið jól og nýggjár eru farin.

Í hesum árinum hava tær umborð á Jarnbardi síðani stutt eftir ársskiftið nýtt ógvuliga nógva orku og tíð upp á venjingar og kappingar. Ólavsøkuaftan stóðu tær sum einasta manningin í hesum róðrarárinum, sum eingin hevði megnað at vunnið á. Eingin hevur verið sum Jarnbardur!

Hetta var áttanda ferðin, at Jarnbardur við kvinnum gjørdist meistari. Tær hava verið meistarar í 1991, 1992, 1993, 1997, 1999, 2000, 2002 og so aftur nú í 2004.



# Føroyameistararnir á Argjabátinum

*Tað eydnaðist ikki Argjabátinum, sum annars hevði vunnið allar undanfarnu róðrarnar, at vinna á ólavsøku. Hóast teir noyddust at taka til takkar við 3. plássinum, vóru teir á Argjabátinum fegnir um meistaraheitið*




## Bólturin spakuliga á rull

**Ein landskappingardystur verður í morgin, og so verður spælt so pø á pø fram til mikukvøldið, tá ið oddadystur verður í Gundadali**

LANDSKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Eftir steypafinalu, Ólavsøkuna og Europa Cup vaknar føroyska fótbóltslandskappingin nú aftur úr dvala. Tíggjunda umfarið er á skránni næstu dagarnar. Ein dystur verður í morgin, tveir týskvøldið og tveir mikukvøldið.

Í morgin verður grannauppgerð í Fuglafirði, har GÍ fer at vitja ÍF, sum júst hevur verið á venjingarlegu í Aalborg.

Týskvøldið spæla B68-KÍ og EB/Streymur-B36, og mikukvøldið spæla VB-NSÍ og so HB-Skála, sum er toppdystur. HB vann ólavsøkudag steypafinaluna 3-1 á NSÍ, og ólavsøkuaftan vann Skála í Gundadali 5-1 á KÍ.

## B68 ein brasiliumann afturat

**Hóast tað bara er loyvt at hava fýra útlendingar á liðnum í senn, so hevur B68 í summar fingið fýra útispælarar afturat pólverska málverjanum**

B68 BRYNJING
*Jóannes Hansen*

B68 er við bara einum stigi niðast á støðutalvuni. Skal metast út frá aktivitetinum á Svangaskarði í summarsteðginum, so tykist tað sum um, at toftamenn hava verið greiðir yvir, at støðan hevur verið alt annað enn góð, og at teir ikki hava viljað funnið seg í, at teir skulu flyta niður uttan at gera nakað við tað.

Fyrr í summar eru tveir brasiliumenn og ein bulgari komnir til Toftir í teimum ørindum at hjálpa B68 eftir summarsteðgin, og nú er enn ein brasiliumaður komin á Toftir.

Talan er um 23 ára gamla Murilo, sum hann verður nevndur. Hann er miðvallari, og sigst eisini vera væl brúkiligur bæði í álopinum og í verjuni.

Murilo er uppvaksin í Flamingo í Rio. Hetta man vera kendasta fótbóltsfelagið av øllum í Brasilia. Hann sigst hava verið á bestu ungdómsliðunum hjá felagnum, men tað hevur ikki eydnast honum at vinna sær pláss á besta liðnum. Nú ætlar hann eftir øllum at døma at royna seg í Europa. Umvegis danskan umboðsmann og Jákup í Stórustovu er hann í fyrstu atløgu komin á Svangaskarð, har hann skal vera við til at hjálpa B68 at sleppa undan niðurflyting.

B68 hevur nú fimm útlendskar spælarar í hópinum. Ásetingarnar siga, at tað er bara loyvt at hava fýra á vøllinum í senn. Men tað er eingin forðing fyri, at allir fimm standa á dómaraseðlinum, og at ein útlendingur kemur á vøllin fyri ein annan.

Í Letlandi vóru pólverski málverjin, bulgarski miðvallarin og Anderson úr Brasilia á liðnum. Tað hevur verið bíðað eftir loyvunum til ein og nú tveir brasiliumenn. Roknað verður við, at í hvussu so er annar teirra verður við, tá ið B68 týskvøldið skal spæla landskappingardyst á heimavølli ímóti KÍ.